# TILTØK

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Patrick Sheils í Mariukirkjuni.

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið kl. 20 er Bønarmøti. www.hebron.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15.00: Bønarmøti.
Øll eru vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 11.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Halgidómsmál í Hebrearabrævinum.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
www.rhema.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Derhard Olsen.

**Samkoman Immanuel**
Mikukvøldið kl. 20.00: Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Telefonandaktin 424741

**Samkoman Lívdin**
Heimasíðan: www.livdin.fo

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnukvøldið kl. 19 Møti við Paula Høj. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Felags húsmøti verður mikukvøldið hjá Dánjal Gaardlykke, Runavík kl. 20.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Osvald Kjærbo talar. Evni: Umvending og endurnýggjan. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
www.kuff.fo

**Betania, Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11: Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánakvøld kl. 21: Bønarmøti. Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Frá 1. juli til 18. august hava vit opið frá kl. 13.00-17.00.**
***Fotoframsýning* í kjallaranum í Tilhaldinum av útoyggjamyndum hjá Hjalmari Waag Høgnesen verður til og við 8. august 2003.**
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.30
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Javni**
Skrivstovan er *stongd vegna summarfrí.* Opið er aftur 11. august 2003.
Hevur tú atrokandi boð ella spurning, so ring til lim í starvsnevndini ella økisnevndini.
Heimasíðan: www. javni.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er farin í feriu frá 26. juni til 1. september

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317,

**Ráðgeving um heilaskaðar**
Hevur tú fingið ein heilaskaða, ert avvarðandi ella arbeiðir við fólki við heilaskaða og hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi ella annað, so ert tú vælkomin at venda tær til okkara.
NeuroCom, 450 Oyrarbakki
Tlf. 422 763 ella Fartlf.: 225 263
Teldupostur: info@heilsu.info
www.heilsu.info
e-mail: fhkv@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
MBF skrivstovan verður stongd frá mánadegi 14. juli til 10. august.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C, 100 Tórsh.
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.00.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/ 211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 322686.
Umsóknarbløð til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

**LISA - Skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu**
Tlf: 320197
Teldupostur: lisa@lisa.fo
Heimasíða www.lisa.fo
Opið: mánad. - fríggjad. kl. 9-12, tó týsd. kl. 16.30 - 20.30
Vegna feriu verður skrivstovan stongd frá 7. juli til 3. august

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 5. august hava hjúnini Agnas og Per Andrew Olsen, Klaksvík verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

## GULLBRÚDLEYP

Mánadagin 11. august hava Hjørdis og Edvard Vilhelmsen, Tórshavn, verið gift í 50 ár. Opið hús verður Millum Gilja 1, Hoyvík, frá kl 19.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 9. august kl. 14.00 giftast í Asnæs Kirke Gyða í Gongini og Morten Hansen.
Brúdleypsadressan: Høve Skovpavillon, Pavillonvej 15, Høve Strand, 4550 Asnæs.



# Niður við nakkanum

**U–17 dreingirnir megnaðu ikki at skjóta mál í NM kappingini, og í tveimum teimum seinastu dystunum taptu teir stórt**

U–17 NM KAPPING
*Jóannes Hansen*

Seinnapartin í gjár kom U–17 landsliðið aftur til Føroya, eftir at teir høvdu luttikið í NM kappingini í Hamar í Noregi.

Føroyar endaðu á 8. og aftasta plássinum, og í tveimum teimum seinastu dystunum gekst tað einki serligt. Í síðsta bólkadystinum, sum fríggjadagin var ímóti Finnlandi, løgdu Føroyar rygg til 5–0 tap, og í dystinum um sjeynda plássið, sum sunnudagin var ímóti Íslandi, stóð tað 4–0 til Ísland, tá ið teir 80 minuttirnir vóru farnir. Tað var málleyst inntil eitt korter undan leikloki.

Harvið var greitt, at Føroyar høvdu spælt fýra dystir uttan at skjóta mál, og at mótstøðuliðini tilsaman gjørdu fjúrtan mál.

Í fjør spældu Føroyar og Danmark javnt í hesi kappingini. Hesa ferð vann Danmark finaluna. Teir spældu ímóti Skotlandi, og úrslitið var 1–0. Einsamalli málskjúttin var Lasse Quist, sum hevur skorað seks mál í fýra dystum og verður spáddur at eiga spennandi framtíð sum fótbóltsspælari.

Í innleiðandi bólkinum vóru Føroyar í bólki við Skotlandi. Úrslitið í uppgerðini millum Føroyar og Skotland var 2–0 til Skotland.

# Jón Rói er í uppaftur størri kapping

**Michael Laudrup hevur gjørt av at flyta ein miðverja afturat upp í besta hópin hjá Brøndby**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Jón Rói Jacobsen er framvegis millum teir bestu spælararnar í Brøndby. Í tveimum teimum fyrstu umførunum í superliguni er hann ikki sloppin á vøllin, men sjálvur metir hann tíðina sum lærligatíð. Sum vit áður hava sagt, so er kappingin stór, og tað hava verið tríggir miðverjar framman fyri hann í kappingini um tvey pláss. Umframt liðformannin Per Nielsen og svenska Andreas Jakobsson er tað Dan Anton Johansen, sum í fjør var fastur í miðverjuni. Í tveimum teimum fyrstu umførunum hevur Dan Anton verið høgri vongverji, tí Allan Olsen, sum plagar at vera vongverji, hevur verið skaddur.

Dan Anton Johansen hevur spælt sera sannførandi, og tað verður ivaleyst torført hjá skadda manninum at vippa hann úr plássinum aftur. Um annar av miðverjunum verður skaddur ella leikbannaður, so verður Dan Anton Johansen ivaleyst fluttur inn hagar, so tað ræður um at hava tol hjá Jón Róa Jacobsen.

Nú hevur Michael Laudrup fingið ein miðverja afturat, sum venur saman við teimum bestu. Tað er 20 ára gamli Thomas Hansen, sum er uppvaksin í Brøndby og sum hevur spælt 14 unglingalandsdystir. Í síðstu viku fekk hann boðini um, at hann skal venja við besta liðnum. Í donskum fjølmiðlum hevur hann sagt, at málið hjá honum er at vinna sær fast pláss á liðnum, samstundis sum hann ásannar, at tað verður torført við tí manning og gongd, sum Brøndby í løtuni hevur.

# Akranes framvegis niðarlaga

**Í síðstu viku taptiÍA á heimavølli ímóti KR úr Reykjavík, sum nú er annað av oddaliðunum**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

Tað gongst einki serligt hjá Akranesi og Juliani Johnsson. Teir hava støðugt verið staddir lítið omanfyri niðurflytingar strikuna. Tvær tær síðstu vikurnar hava vónir verið fyri, at teir kundu lætta sær nøkur pláss upp frá áttanda plássinum, sum teir leingi hava verið á, men tað hevur ikki eydnast.

Tá ið KR úr Reykjavík vitjaði, var fyrsta løtan bragdlig hjá Akranesi. Teir settu hol á longu í 2. minutti, men ein hálvan tíma seinni snaraðist gongdin fullkomuliga á. Eftir trimum minuttum skoraði KR tvey mál, og tá ið tað restaði eitt lítið korter, øktu teir til 3–1.

ÍA royndi at stríðast fyri at koma afturíaftur, og teir fingu eitt mál afturat.

Julian Johnsson var á miðvøllinum hjá heimaliðnum allar 90 minuttirnar. Tá ið teir fingu síðsta málið, var tað eftir at málverjin hevði hálvbjargað skotroynd frá Juliani.

KR, sum í fjør var meistari, og sum longu er farið burturúr Europa Cup kappingini, er á meistarakós eina ferð enn. Saman við einum øðrum høvuðsstaðarliði, Fylkir, eru teir fremst í kappingini.

# Vejle sett rudduliga upp á pláss

**Christian Høgni Jacobsen varð settur á vøllin miðskeiðis í 2. hálvleiki, tá ið Køge var frammanfyri 3–0**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Næstbesta danska deildin fór undir nýggja kappingarárið í hesum vikuskiftinum. Vejle var í Køge, har teir taptu 5–1. Í venjingardystunum upp undir kappingarbyrjan hevur Christian Høgni Jacobsen fleiri ferðir verið ímillum teir fyrstu ellivu. Onkra ferðina hevur hann verið í álopinum, og aðrar ferðir hevur hann verið á vongverjanum í høgru.

Tá ið Vejle var í Køge hevði nýggi venjarin, fyrrverandi álopsspælarin hjá Vejle, Steen Thychosen, sum eisini hevur roynt seg uttanlands og á danska landsliðnum, valt at seta Christian Høgna á beinkin.

Vejle liðið er rættuliga ungt. Miðalaldurin er 20 ár, og teir hava undirstrikað, at tað er ikki nakað avgjørt mál, at teir í hesum kappingarárinum skulu vinna seg uppaftur í bestu deildina, sum tað er eitt ár síðani, at teir duttu niður úr.

Í Køge sást, at tað verður strevið hjá Vejle. Teir taptu 5–1. Støðan í hálvleikinum var 3–0, og sami spælari hevði eftir átta minuttum skorað øll trý málini. Danskir fjølmiðlar siga, at Køge, sum er flutt niður, var so nógv betri enn Vejle, og teir vísa á, at úrslitið ber boð um, hvussu stórur munur tað er á tveimum teimum bestu deildunum. Køge stóð seg ikki í superliguni, men ímóti einum av teimum, sum í fjør stóð seg frægast í næstbestu deildini, vunnu teir stórt.

Miðskeiðis í 2. hálvleiki varð Christian Høgni settur á vøllin. Hesa ferð var tað sum annar av álopsmonnunum, men tað var ikki hann, sum skoraði einsamalla Vejle málið.

Silkeborg flutti niður í summar, og teir fingu góða byrjan í næstbestu deildini, eftir at teir í 16 ár høvdu verið í bestu deildini. Silkeborg vann 6–0 á B1913, sum í fjør akkurát megnaði at sleppa undan niðurflyting.

HFK Sønderjylland hevði vitjan av Randers FC, sum ikki hevur Atla Greggersen í hópinum longur. 4.473 áskoðarar møttu í Haderslev. Tað er sjáldsama nógv í 1. deild, og teir vóru allir í góðum hýri, tí heimaliðið vann 5–3.

Johan Byrial Hansen og AC Horsens høvdu vitjan av Brønshøj, sum varð sent aftur til Keypmannahavnar við 2–0 tapi. Eitt av mest óvæntaðu úrslitunum var, at Skjold, sum í fjør stóð seg so sera væl, á heimavølli skuldi tapa 3–2 ímóti Fremad Amager, sum eftir fleiri ár í triði bestu deildini nú var aftur í 1. deild.

**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 05.08. | kl. $19^{30}$ | Týsdagin | 05.08. | kl. $22^{00}$ |
| Mikudagin | 06.08. | kl. $19^{30}$ | Mikudagin | 06.08. | kl. $22^{00}$ |
| Hósdagin | 07.08. | kl. $19^{30}$ | Hósdagin | 07.08. | kl. $22^{00}$ |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 05.08. | kl. $23^{00}$ | Mikudagin | 06.08. | kl. $23^{00}$ |
| Hósdagin | 07.08. | kl. $23^{00}$ | | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 05.08. | kl. $20^{45}$ | Mikudagin | 06.08. | kl. $20^{45}$ |
| Hósdagin | 07.08. | kl. $20^{45}$ | *– Seinasta sýning* | | |




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Týsdagin | 05.08. | kl. $18^{30}$ | Mikudagin | 06.08. | kl. $18^{30}$ |
| Hósdagin | 07.08. | kl. $18^{30}$ | *– Seinasta sýning* | | |

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning Fríggjadagin 08.08.**




**Frumsýning Fríggjadagin 08.08.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**